## AaB tapti heima

Felagið hjá Jón Róa Jacobsen og Súna Olsen, AaB, spældi í gjár á heimavølli ímóti OB, men enn einaferð mátti liðið hjá føroysku landsliðsleikarunum ásannað, at tað ikki gongur heilt eftir vild. OB vann nevniliga dystin 3-2, eftir at teir eisini høvdu ført 2-1 í hálvleikinum. Súni Olsen var slett ikki í hópinum hjá AaB til henda dystin, meðan Jón Rói Jacobsen byrjaði á beinkinum. Hann kom á vøllin í 86. minutti fyri José Mota.



## Atli og Frem taptu

Atli Danielsen byrjaði á vøllinum, tá Frem var á vitjan hjá Hvidovre um vikuskiftið. Um miðjan fyrra hálvleik tók Hvidovre leiðsluna við máli frá Ayoub Sørensen, og hesa leiðslu megnaðu teir at halda allan vegin, tí dysturin endaði nevniliga 1-0. Atli Danielsen bleiv tikin út í 77. minutti, tá Frem satsaði at fáa javnleikin í hús.

# Skeivt upp á bein í Runavík

**Skála sigurin var søguligur, tí hetta var fyrsta ferðin nakrantíð, at skálamenn fóru úr Runavík við øllum stigunum**

NSÍ-SKÁLA

*Jóannes Hansen*

Søguligu hagtølini boðaðu frá tí, og støðutalvan segði tað, nú tveir triðingar av hesum kappingarárinum vóru farnir aftur um bak. Men veruleikin lagaði seg ikki eftir søguligu hagtølunum og støðutalvuni.

NSÍ livdi á ongan hátt upp til tað, sum teir áður hava megnað á heimavølli ímóti grannunum hinumegin fjørðin, og NSÍ livdi ikki upp til tað, sum teir hava víst fyrr í ár, og sum hevði lyft teir upp á ovastu rók.

Skála vann fyri fyrstu ferð nakrantíð í Runavík. John Petersen hevði potað mót og dirvið inn í sínar menn. Teir vóru ikki farnir um fjørðin fyri at avmarkað tapið. Obi var sannur brandur á toppinum, Bogi Gregersen víst fínan hugburð, á miðvøllinum vóru tað liðformaðurin Pauli G. Hansen, Pætur Dam Jacobsen, Levi Hanssen og Bárður Danielsen, sum settu dagsskránna, og verjan var væl skipað.

Í hinari leguni var tað ikki so nógv, sum gekk eftir vild. Eitt stórt korter í 2. hálvleiki sást farri av spæli, sum kann vera orsøk til toppplasering. Eftir at liðformaðurin og ársins NSÍ spælari higartil í ár, Óli Hansen, stutt eftir steðgin og eftir innkast hevði javnað til 1-1, lá tað í luftini, at tað enn eina ferð fór at enda við, at Skála skuldi fara tómhent úr Runavík.

Soleiðis endaði tað tó ikki. Jens Martin Knudsen helt seg eiga fríspark, men gloymdi at bíða eftir bríkslinum, áðrenn hann í orðsins sanna týdningi tók søkina í egnar hendur. Hann fór óregluliga fram, og tá ið dómarin ikki hevði hildið orsøk at vera at bríksla fyri frísparkinum, var einki annað at gera enn at bríksla fyri púra óneyðuga brotssparkinum.

Alexandur Johansen, sum tíggju minuttir frammanundan varð komin á vøllin, var púra tryggur úr ellivu metrum. Ein lítil hálvur tími restaði, og NSÍ kollsigldi.

Tolið var ikki til at bíða eftir, at samanspæl og liðavrik skuldu bera útjavnandi málið og síðani kanska sigursmálið og harvið varðveittan oddasess við sær. Lyklaspælararnir livdu á ongan hátt upp til tað, sum roknast kann við av teimum. Nenad Stankovic var skuggi av sær sjálvum ímóti sínum gomlu liðfeløgum, Hjalgrím Elttør var ikki á høga støðinum, sum hann annars hevur víst í Runavík, og Christian Høgni Jacobsen hevði ilt við at slíta seg leysan og koma til møguleikarnar, sum hann er fingin til Runavíkar at gera nyttu burturúr.

NSÍ royndi seg við úrskiftingum og broytinum. Óli Hansen var settur fram í álopið, og síðstu stóru løtuna tóktust teir at hava fimm ella seks í fremstu røð. Tá ið tað ikki eydnaðist at samanspæla, varð vónað, at tað skuldi eydnast at fáa mál eftir langa sending, nærdyst og returbólt, men heldur ikki tað eydnaðist henda dagin, tá ið teir í Runavík vóru skeivt upp á bein.

Fyrstu lítlu løtuna var tað einki, sum bendi á, at NSÍ ikki skuldi sláa tónan ann. Teir høvdu bólin ímillum sín, og Einar Hansen sendi fínt skot dygst omanfyri málið.

Í verjupartinum var tað ikki so trygt og sannførandi, sum tað plagar at vera. Obi og Bogi Gregersen stressaðu teir aftastu, og tað bar úirtøku við sær longu í 6. minutti, tá ið Obi fangaði skeiva sending, spældi Boga Gregersen og so var Skála á odda og harvið fyritreytirnar heilt øðrvísi, enn tað frammanundan varð roknað við.

Skála kundi havt økt um leiðsluna, men Johan Troest Davidsen ruddaði burtur á strikuni, tá ið Bogi Gregersen hevði sent framvið Jens Martini Knudsen.

Lagið var einki serligt á heimamonnunum, tá ið Lars Müller hevði bríkslað fyri síðstu ferð. Uggin kann vera, at tað neyvan fleiri ferðir verður so skeivt upp á bein, sum tað var hesa ferð.



*Skála hevði ongantíð vunnið við Løkin í Runavík undan dystinum sunnudagin, men líka løgdu skálamenn í. Teir vunnu nevniliga 2-1 á oddaliðnum, NSÍ, sum eftir ósigurin má ásanna, at B36 nú er nýtt oddalið.*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

## - Altíð trupult móti Skála

Liðskiparin hjá NSÍ, Óli Hansen, var sjálvsagt skuffaður um tapið ímóti Skála, tá vit fingu orðið á hann. Vit spurdu hann, hvat tað var, sum gekk galið. – Tað gongur ikki so nógv galið hjá okkum. Dystirnir í millum NSÍ og Skála eru altíð tættir og truplir, og tað vita vit eisini frammanundan. Teir liggja rættiliga langt afturi á vøllinum henda dystin, og eg haldi, at teir duga væl at bróta okkara álopsspæl niður. Samstundis koyra teir við skjótum mótálopum, og hetta eydnaðist hjá teimum, staðfestir Óli Hansen.

## - Spældu illa, men vunnu

Soleiðis tekur liðskiparin hjá Skála, Pauli G. Hansen, saman um dystin í Runavík í gjár, har Skála vann. – Vit fóru inn til Runavíkar at vinna dystin, og hetta eydnaðist okkum. Vit høvdu ongantíð vunnið í Runavík undan hesum, og hetta er kanska tann vánaligasti dysturin, sum vit hava spælt við Løkin nakrantíð, og allíkavæl vinna vit. Pauli segði eisini, at leikararnir kanska vóru serliga uppsettir henda dagin. – Um man vil tað ella ei, so er hetta ein lokaluppgerð, og tað er altíð nakað serligt. Tá eru menn eyka uppsettir, staðfestir Skálaliðskiparin at enda.